# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Einasta úrslit var, at fiskimálaráðharrin í Útvarpinum ilskaðist inn á meg fyri at eg dittaði mær til í summarfrítíðini at koma við tílíkum*

*Atli Hansen*

## Ólavsøka á Bryggjuni letur upp dyr

"Opinleiki virkar sum kunnugt báðar vegir". Soleiðis tók Niels Salmony, eldsálin og formaðurin fyri ólavsøkuhaldið í Keymannahavn til, tá hann tók saman um væleydnaðu ólavsøkudagarnar á Bryggjuni. Við hesum sipaði hann til, at letur tú tína egnu hurð upp fyri øðrum, stendur hon aloftast samstundis víðopin inn til onnur.

Vit føroyingar fýlast javnan á, at myndin, danir og onnur hava av okkum, er bæði einsháttað og skeiv. Men vilt tú taka ímóti, mást tú eisini lata nakað frá tær sjálvum. Í staðin fyri at illneitast áttu vit kanska at hýst tankanum um, at vit sjálvi ikki altíð hava dugað líka væl at lata okkara land og mentan upp fyri øðrum.

Við ólavsøkuhaldinum á Bryggjuni var partur av okkara tjóðarhátíð bæði ítøkiliga og myndaliga fluttur út um bøgarðarnar. Her høvdu stigtakararnir av sonnum skapað og brúkt eitt høvi at visa øðrum, hvørji vit eru. Meir enn nakað annað boðaðu hesir dagarnir frá einum mentanarligum og tjóðarligum gávumildi, so tað neyvan hevur kenst meir fjálgandi og fríandi at vera føroyingur. Eitt gávumildi, sum týðiliga gav afturljóð í jaliga áhuganum og forvitninum hjá mongu gestunum, sum stukku framvið hesar dagarnar.

Víst er ólavsøkuhaldið í Keypmannahavn eisini eitt høvi hjá føroyskum útisetum at savnast um heimligar siðvenjur og kensluna av felags røtum. Slíkt styrkir samleikan og uttan hann, hevur tú lítið at bjóða øðrum – allarminst um tú vilt verða viðleikari í einum nútímans altjóðagjørdum heimi.

Men ein sterkur samleiki tolir eisini atfinningar – eisini tá tær koma frá tínum "egnu". Í einum altjóðagjørdum heimi er tíðin farin frá erkvisnum glepsum eftir føroyskum útsietum, sum ditta sær til at blanda seg í kjakið her heima við onkrum sannleika. Heldur enn at undirmeta teirra støðu sum útisetar, eiga vit at virðismeta hana sum eitt serstakt høvi at síggja okkum sjálvi útifrá í einum øðrum og ofta klárari ljósi.

Sum føroyski sendimaðurin í Keypmannahavn, Herálvur Joensen, nevndi í setanarrøðuni á Bryggjuni, so hevur føroyska fólkaræðið altíð notið gott av, at føroyingar, ið búleikast uttanlands, siga sína hjartans hugsan um evni, ið eru frammi í føroyska kjakinum. Og tá saman um kemur, snýr fólkaræði seg um at kunna rúma øðrum og øðrvísi fatanum av lívinum og heiminum. At geva og taka ímóti í einum áhaldandi samskifti, ið strembar eftir at læra av og skapa pláss fyri hvørjum øðrum.

Í so máta var ólavsøkuhaldið á Bryggjuni ein ítøkilig ímynd um, at dyrnar fyri einum markleyskum og mennandi samskifti við umheimin standa víðopnar. Nú er tað bara upp til okkum, hvussu vit brúka hendan møguleikan.

**Sosialurin**

# Fiskivinnuumsitingin má purrast út!

**ATLI HANSEN**

Fyri uml. 2 vikum síðani gjørdi eg nakrar viðmerkingar til Útvarp Føroya um ta stóru mongd av sild og makreli ið tykist at hava verið norðan- og eystanfyri oyggjarnar í summar - og framvegis er. Eg gjørdi hetta mest fyri at provokera landsins fiskivinnumyndugleikar til at vísa áhuga fyri hesum ríkidømi, at fáa hetta staðfest alment soleiðis at vit kunnu brúka tað til í samráðingum við strandalondini at undirbyggja okkara krøv og kanska at seta størri krøv. Ætlað sum ein hjálp til fiskivinnumyndugleikarnar. Hetta skuldi eisini skiljast sum ein heilsan til Fiskiveiðueftirliti um at fylgja við í teimum stóru nøgdum av sild og makreli, sum verða flutt úr okkara sjóøki av fremmandum skipum.

Men gakk. Einasta úrslit var, at fiskimálaráðharrin í Útvarpinum ilskaðist inn á meg fyri at eg dittaði mær til í summarfrítíðini at koma við tílíkum. Ein høvuðsatfinning var, at eg brúkti tað góða gamla føroyska orðið "at tveita á borðið". Tá hevur ein ikki nógv at føra fram, um hetta var største hárið í suppuni. Og tá hevur man helst ikki skilt boðskapin - soleiðis sum tað eisini vísti seg seinni í samrøðuni.

Tað sum skelkaði meg mest var tá ið útvarpsmaðurin spurdi fiskimálaráðharran, um hann fór at býta meira sildakvotu út, um hesi 65.000 tonsini vóru uppfiskaðið. Hann svaraði, at hann fyrst vildi síggja, at skipini kláraðu at fiska hetta upp. Og sjálvandi skulu Føroyar hava so stórar kvotur sum gjørligt. Politiskir flosklar hoyra heima í einum valstríði. Tað áhugaverda er, hvussu fáa vit hesar størru kvoturnar?

Skulu Føroyar biðja um kvotu eftir hvussu nógv verandi floti klárar at fiska? Nótaskipini klára at fiska hesa sildarkvotuna fleiri ferðir, um vit bert vita frá ársbyrjan, hvørjar treytirnar eru. Men hetta vil ráðharrin ikki lata okkum vita, tí hann vil hava møguleika fyri gjøgnum ári at broyta, glíða og leska. Loyvini verða ikki útskrivaði fyrr enn hálvt ár er farið. Makrelloyvini t.d. eru ikki komin enn, so vit hava ikki loyvi at fiska makrelin norðanfyri - soleiðis sum onnur skip.

Nei, Føroyar skulu ikki hava kvotir eftir, hvat ein ávísur skipabólkur klárar at fiska. Vit skulu hava okkara rættvísispart av øllum teim kvotum, har vit hava ein rætt - soleiðis sum tað stendur í Lógini um vinnuligan fiskiskap § 2. Og henda rætt og henda part fáa vit bert við argumentum - bert við at vísa á teir faktorar, sum vanliga liggja til grund fyri býti av TAC (mest loyvdu veiðu) - og eitt av hesum argumentum er nøgdin og tíðin, ein ávísur stovnur stendur í okkara sjógvi. Tað hevur ofta verið skotið eftir okkum, at vit hava eina makrelkvotu sum eitt strandaland, íð vit ikki áttu at verið. Men nú er tímin komin hjá okkum at vísa, at vit eru strandaland - og tað í ólukkumát. Havið kókar av sild og makreli á teimum gomlu sildarleiðunum.

Bæði í fjør og í ár hevur so nógvur makrelur verið í føroyskum sjóøki, at hann hevur verið ein trupulleiki sum hjáveiða í sildini. Føroysku skipini hava silgt undan makreli meðan útlendsk skip hava lagt seg á hann. Men lítið hevur verið gjørt frá almennari føroyskari síðu fyri at dokumentera henda veruleika og enn minni fyri at boða okkara samráðingarpørtum frá hesum. Onnur lond blása í lúður tá íð slíkt hendir.

Einasta vit vita um rannsóknir eftir makreli og sild í summar er, at tveir norskir nótabátar vórðu sendir at sigla ígjøgnum okkara øki og gera kanningar. Endre Dyrøy kom inn á Nólsoyarbankan og helt so beint norðureftir, har hann kom fram á tey føroysku nótaskipini norðan fyri 63 stig og tosaði við tey. Libas silgdi beint vestur eftir uml. 63 stig. Báðir gjørdu kanningar við troli og søgdu seg øtast yvir tað mongd av sild og makreli, sum tá var at síggja ógvuliga víða um í føroyskum sjógvi.

Í Felagnum Nótaskip hava vit lagt nógv trýst á landsstýrismannin í fiskivinnumálum um at arbeiða fyri størri silda- og makrelkvotum, men tað er sum um tað er hansara áskoðan, at Føroyar eiga ikki at fáa fleiri ella størri kvotur. Vit hava ikki rætt til meira.

Mítt ørindi við hesum er at boða øllum føroyingum frá, at vit eiga eitt stórt ríkidømi av sild og makreli norðan- og eystanfyri oyggjarnar her um summari, men tað verður stórt sæð ikki brúkt í politiskum høpi t.v.s. til at krevja ein størri og rættvísari part av heildarkvotunum og harvið til at styrkja okkara støðu undir samráðingum.

Eitt serligt úrslit av vantandi huginum hjá landsstýrimanninum at loysa kvotatrupulleikar og at greiða loyvisflœkir hava vit sæð í fiskiskapinum eftir sild eystanfyri Føroyar. Alt ein stórur hurlivasi.

Norðhavsildin varð í síni tíð definarað sum ein stovnur norðanfyri 62 breiddarstig. Hetta er nú strikað úr føroysku loyvunum. Veit ikki hvat hini londini hava gjørt.

Vit fingu táverandi landsstýrismann Jørgin Niclasen til at útskriva okkum loyvir til at fiska sild (og hestamakrel) sunnanfyri 62 stig, tí at har við hvørt hevur verið sild og vit hava hildið tað vera ein annan stovn, so her var ein møguleiki hjá føroyingum at skaffa sær sín egna sildarstovn eins og t.d. Ísland.

Loyvir vóru givin at veiða "heystgýtandi føroyska sild við nót sunnanfyri 62 stig". Hesi loyvir vórðu givin til øll nóta- og ídnaðarskip við 1000 tonsum til hvønn. Tá íð eingin sild hevur verið á hesum

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14.00

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.